2.deild: LÍF – FS Vágar 0-3 (0-1)

# Góður sigur til vágamenn

**Í einum rótutum og til tíðir hart leiktum dysti vann FS Vágar uppiborið á LÍF**

FÓTBÓLTUR
*Bjartur Nolsøe*

Tað var LÍF sum legði betri fyri í dystinum í Lorvík leygardagin. Teir royndu at leggja eitt trýst á FS Vágar, og eydnaðist hetta eisini í ávísan mun. Lorvíkingar komu fram til nakrar hálvar málmøguleikar, uttan tó at gerast serliga vandamiklir.

FS Vágar hevði týðuliga ringt við á fóta sær á vøllinum, og tí bleiv tað ofta til skeivar avleveringar, sum gav LÍF bóltin aftur.

### Vágamenn tóku yvir

Sum fyrri hálvleikur leið, kom FS Vágar tó betri við í dystin. LÍF legði seg meiri aftur á vøllin, tá teir sóðu at tað trýst sum teir royndu at leggja á vágamenn, ikki førdi til nakað.

Tá eitt korter var farið av dystinum, kemur fyrsti veruligi málmøguleikin í dystinum. Bólturin verður spældur ígjøgnum miðverjuna hjá LÍF, og har gerst Bjarni Prior leysur og skýtur á stongina og út.

5 minuttir seinni sleppur Bjarni aftur leysur, men verður órógvaður so mikið at dómarin dømir fríspark á sjálvari brotsteigarlinjuni, og gult kort til lorvíkingin. Her slapp LÍF heldur bíliga, tí tá tað bleiv dømt fríspark og vágamaðurin var leysur ígjøgnum, átti hetta at verið revsað við meira enn gulum kortið.

Vágamenn fingu fleiri møgleikar sum kundu givið mál, men antin vóru teir óneyvir ella bjargaði málmaðurin hjá LÍF.

Lorvíkingar høvdu okkurt langskot móti málinum, uttan at teir tó veruliga fingu roynt málmannin hjá FS Vágum.

2 minuttir fyri hálvleik kemur so fyrsta málið í dystinum. Eftir hornaspark kemur Kim Poulsen at standa leysur og kann lætt skjóta bóltin í mál til 1-0 til vágamenn.

Hetta var hálvleikstøðan og var tað fult uppiborið at vágamenn vóru á odda.

Seinni hálvleikur var ikki meir enn byrjaður so fáa vágamenn brotsspark, sum Jens Erik Rasmussen setur í mál til 2-0.

### Hart spæl

Vágamenn høvdu nú uppbygt sær eina trygga leiðslu, og kundu nú leggja dent á at verja hesa leiðslu. Tað var ilt at síggja, hvussu lorvíkingar skuldu kunna leggja trýst á vágamenn, og harvið koma við aftur í dystin.

Næsta løtan var merkt av hørðum spæli við nógvum fríspørkum og gulum kortum.

Dómarin átti at havt steðgað hesum nógv fyrr, men í staðin fingu spælararnir loyvi at halda fram. Dómarin hevði sum heild ringt við at stýra dystinum hesa løtuna.

Bæði Ari Thomassen og Hannis Olsen hjá FS Vágum noyddist út við skaða miðskeiðis í seinna hálvleiki, og ikki er vist at teir verða klárir aftur í bræði.

Móti endanum fór leikferðin úr dystinum, og var tað sum um at liðini høvdu sligið seg til tols við, at dysturin var avgjørdur.

Eitt mál kom tó aftrat, og varð tað aftur FS Vágar sum skoraði. Brasiliumaðurin Clayton Soares, sleppur at renna einsamallur frá miðum vølli, og skorar framvið Karsten i LÍF-málinum.

Hetta var tað síðsta sum hendi í dystinum. Ongin ivi er um, at betra liðið vann, og vágamenn vístu enn einaferð, at teir koma at liggja heilt frammi í kappingini í ár.

### Dysturin í tølum:

**LÍF-FS Vágar 0-3(0-1)**
0-1: Kim Poulsen
0-2: Jens Erik Rasmussen (brotspark)
0-3: Clayton Soares

2. deild: B36 – HB 2-2 (1-2)

# Havnarliðini býttu stigini

**B36 og HB fingu hvør sítt stig í fyrsta dystinum í landskappingini í ár. HB førdi annars við tveimum málum, og teir munnu iðra seg um, at teir ikki megnaðu at halda fast um leiðsluna. Ístaðin reisti B36 seg aftur og fekk annað stigið**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Rani Christiansen í leysari luft frammanfyri Tórálvi Poulsen úr B36. Aftanfyri síggjast Jóannes Jacobsen við stongina og málverjin Pól Næs Joensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyrsti dysturin í landskappingini í 2. deild lagaði tað soleiðis, at grannarnir brustu saman í fyrsta umfari.

HB stýrdi spælinum allan fyrra hálvleik og legði seg eisini framum við tveimum málum, sum Rókur av Fløtum Jespersen skoraði. Hann var annars óheppin, tá hann og ein verjuleikari brustu høvdini saman. Rókur mátti seymast aftur við fýra pentum.

Fyrra málið kom eftir gjøgnumbrot í høgru. B36-ararnir steðgaðu á, tí teir mettu seg eiga eitt klárt fríspark, men dómarin lat ikki við seg koma, og hesum gjørdu HB-ararnir sær dælt av.

Ransin Djurhuus leggur inn til Rók, sum er púra leysur við málverjanum, tí verjan svav hesa løtuna. Hann er kaldur og trillar framvið Magnusi í málinum.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki økir HB um leiðsluna. Eitt fríspark verður sent innfyri, og Bernhard Petersen er hægstur við handaru stong. Hann høvdar bóltin inn aftur í málteigin, har Rókur hevur lætt við at skumpa bóltin tann seinasta teinin innum.

### B36 svarar aftur

Sigast kann um fyrra hálvleik, at HB stýrdi gongdini. Teir skaptu nógv fleiri málmøguleikar, og B36 hevði ilt við at fáa fatur á bóltinum, sum koyrdi væl ímillum leikararnar í svørtum og reyðum.

B36 megnaði tó at svara aftur fyri steðgin. Ein høgur bólturin verður lyftur uppum HB-verjuna, og har liggur Bergur Midjord og lúrir. Hann tekur bóltin niður og skýtur spakuliga framvið málverjanum.

Stutt eftir bríkslaði dómarin fyri steðginum, og B36 hevði fingið mótið aftur, nú munurin bara var eitt mál.

B36 legði út sum eitt óløgi í seinna hálvleiki. Hetta gav úrslit rættiliga skjótt. Aftur er tað Bergur Midjord, sum var vandamikli maðurin. Hann dregur framvið fleiri verjuleikarum hjá HB og roynir seg við skoti. Pól Næs Joensen hálvbjargar, men Heini í Skorini er fyrstur á bóltinum.

Hann dregur inni í málteginum framvið fleiri verjuleikarum, sum panikkslignir tveita seg fyri í royndini at verja. At enda setir Heini bóltin í netið til 2-2, sum var endaliga úrslitið.

Bæði liðini høvdu møguleikan at leggja seg framum eftir hetta, men bólturin vildi ikki innum. HB hevði kanska teir vandamiklaru møguleikarnar, men áleypararnir vóru ikki nóg nær lagdir.

### Dysturin í tølum:

**B36-HB 2-2 (1-2)**
0-1: Rókur av Fløtum Jespersen
0-2: Rókur av Fløtum Jespersen
1-2: Bergur Midjord
2-2: Heini í Skorini

# Rógvi Johansen fekk stig

**Vágbingurin luttók um vikuskiftið í súkklukapping í fremstu deildini í Fredrikshavn. Rógvi kom á mál sum nummar fjúrtan, og tað er hann sjálvur væl nøgdur við**

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Tað tykist sum Rógvi Johansen er við at koma fyri seg aftur, eftir skaðan hann fekk í heyst. Leygardagin var hann við í kappingini í Fredrikshavn, og hann kom á mál á fimtanda plássi. Hetta var ein kapping í A-bólkinum, sum er fremsta deildin í Danmark.

Rógvi var ógvuliga virkin har frammi allan vegin gjøgnum kappingina, men honum eydnaðist ikki at vera við í tí rætta útbrotinum.

Føroyski súkklarin hevði frammanundan gjørt av at leggja nógv fyri í hesi kappingini, so hann kundi royna seg sjálvan, og hvussu langt tað bar. Hetta tók nógva megi frá honum, men hann royndi allatíðina at vera við í oddinum. Hann var við í einum útbroti, men tað vísti seg tá, at Rógvi ikki hevði so nógv veiggj eftir í beinunum, og hann orkaði ikki at fylgja við meira.

Hann royndi tó at fanga henda bólkin aftur seinni, men tað eydnaðist ikki. Vinnarin av kappingini var Søren Petersen, ið er fulltíðar yrkissúkklari og koyrir fyri amerikanska liðið Saturn.

Rógvi Johansen var nummar fimtan á mál, og hetta úrslitið er hann sera væl nøgdur við. Hann heldur, at hann aftur er við at koma aftur í venjing eftir skaðan, sum hevur oyðilagt honum venjingina í vetur.

Rógvi gongur framvegis til kanningar á eini ítróttarlæknastovu, og hann skal leggjast undir skurð í november. Rógvi fær tó súkkla sum vant, og hann merkir ikki stórvegis til skaðan.



TB – VB 1-0 (1-0)

# TB vann grannauppgerðina

**Arvafíggindarnir TB og VB møttust á Sevmýri sunnudagin, og tað endaði kanska heldur óvæntað við sigri til TB. Einar Petersen fekk einasta málið í einum dysti, sum var merktur av óskipaðum og harðligum spæli**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*VB royndi at leggja trýst á TB-málið í dystinum sunnudagin, og serliga eftir steðgin hevði liðið bóltin meira, men einki spurdist burturúr. Her hevur Rasmus Nolsøe, vinstrumegin, gott tak á Nenad Zivanovic hjá VB*

TB hevur ikki spælt í 1. deild síðan kappingarárið 1998, tá liðið flutti niður. Teir hava á hvørjum ári verið millum favorittarnar at flyta uppaftur, men tað eydnaðist ikki fyrr enn í fjør, tá teir vunnu 2. deild. Hóast ein langan steðg frá 1. deildar fótbólti skuldu TB-viðhaldsfólk ikki bíða leingi eftir sigrinum.

Nógv vænta, at TB fer at hava eitt torført kappingarár, men TB hevur tó fingið eina dreymabyrjan, tá tvøroyrarmenn vunnu 1-0 á arvafíggindanum úr Vági, og roknast kann við, at hesi trý stigini eru ógvuliga kærkomin at fáa longu í fyrsta dystinum.

Einar Petersen fekk einasta málið í dystinum. Bólturin datt heldur tilvildarliga fyri føturnar á miðvallaranum, eftir at Dan Mortensen hevði lagt ein bólt innfyri úr høgru, sum Magni Jacobsen í VB-verjuni ikki fekk beint burtur. Einar var staddur í málteiginum og hevði tí lætt við at skumpa bóltin inn til 1-0. TB fekk fyrsta málið í 1. deild í fleiri ár eftir bara eitt korter. Hetta vísti seg eisini at vera vinnandi og avgerandi málið.

### VB royndi at trýsta

Dysturin var rokmikil og lítið av góðum fótbóltsspæli var at síggja á vøllinum sunnudagin. Hetta munnu fólk á Tvøroyri leggja líka í, tí teirra lið fór við sigrinum, og so kann alt annað gera tað sama.

Ógvuliga fáir málmøguleikar vóru í fyrra hálvleiki, og málverjarnir høvdu tí lítið at gera. VB hevði tó bóltin meira, men tað gekk striltið við at umseta leikligu yvirvágina til málmøguleikar.

VB saknaði óivað Birgir Jørgensen í álopinum, tí hann hevði givið teimum fleiri møguleikar í álopsspælinum enn Gisli Sveinbjørnsson og Robert Cieslewicz, sum ikki fingu serliga nógv burturúr henda dagin.

Eftir steðgin fór VB at stýra dystinum alt meira, men hóast trýst varð lagt á málið hjá Lars Müller, kom lítið burturúr. VB legði nógvar langar bóltar inn í brotsteigin og hevði eisini fleiri hornaspørk, men einki spurdist burturúr.

At VB sendi nógv fólk fram á vøllin, gav TB møguleikan í skjótálopum, og fleiri ferðir høvdu TB-leikararnir møguleika at skapa stórar málmøguleikar, men vantandi neyvleiki hevði við sær, at Bjarni Johansen sjáldan noyddist at toyggja seg.

Á VB-liðnum var stórur saknur í Birgiri Jørgensen, sum altíð er vandamikil, og Tóra Holm. Teir spældu báðir við 2. deild, sum tapti 3-2 í Sumba leygardagin. Hesir báðir royndu leikararnir høvdu ivaleyst styrkt nógv um liðið. Marek Viersbicki var heldur ikki við vegna skaða í rygginum. Undir dystinum noyddust bæði Jón Pauli Olsen og Magni Jacobsen av vøllinum venga skaða, og hetta darvaði spælinum hjá VB almikið.

### Nenad kundi javna

VB hevði tó ein sera stóran møguleika at javna í teimum seinastu minuttunum. Ein av nýggju leikarunum á liðnum, Nenad Zivanovic, tók bóltin niður við bringuni staddur fimm metrar frá málinum. Hann langaði til, men bólturin fór framvið málinum, tá tey flestu frammanundan høvdu sæð eitt mál til VB fyri sær.

At enda sendi venjarin Predrag Zivkovic fram í álopið, men hann kundi einki gera við støðuna. VB-ararnir kendu seg snýttar fyri tvey brotsspørk í seinna hálvleiki, men hesum taka TB-leikararnir helst ikki undir við.

Annars var dysturin merktur av, at hetta var ein grannauppgerð millum arvafíggindar. Menn góvu alt teir høvdu, og nógv hart spæl var at síggja. Tó fullu bert fimm gul kort, og onkur vil vera við, at dómarin kundi væl givið fleiri kort í dystinum.

Hvørki TB ella VB kann breggja sær av at hava spælt góðan fótbólt leygardagin, og kanska kundi man vænta nakað meira av VB, sum hevur styrkt seg við fleiri leikarum undan hesum kappingarárinum.

Hesin sigurin man vera ógvuliga søtur hjá TB. Fyri tað fyrsta eru trý stig fingin til høldar í fyrsta dystinum, men harafturat var mótstøðuliðið VB, sum hevur verið fremsta liðið í Suðuroynni í fleiri ár, eftir at TB sum oftast hevur havt hendan heiðurin. Sigurin hjá TB sunnudagin var tó ikki óuppiborin, tí teir stríddust fyri stigunum.



*VB sendi nógv fólk niðan á vøllin eftir steðgin, men tvøroyrarmenn megnaðu at halda fast um leiðsluna. TB kann fegnast um fyrsta sigurin í ár*

### Dysturin í tølum:

**TB – VB 1-0 (1-0)**
1-0: Einar Petersen
TB: Lars Müller – Tórur Mortensen, Andras Nolsøe, Vladimir Matijivic – Bárður Dimon, Rasmus Nolsøe, Einar Petersen, Zoran Mancic, Dan Mortensen – Aleksandar Radosavljevic, Allan Michelsen
VB: Bjarni Johansen – Magni Jacobsen, Eyðun Jacobsen, Predrag Zivkovic – Mortan úr Hørg, Palli Augustinussen, Slobodan Madzar, Nenad Zivanovic, Jón Pauli Olsen – Robert Cieslewicz, Gisli Sveinbjørnsson

2. deild: B71 – NSÍ 3-0 (1-0)

# Niðurflytarar vunnu

**B71, sum í fjør fór ta tungu gongd niður í 2. deild, kom væl frá byrjan, tá sandoyingar vunnu 3-0 á NSÍ. Jónsvein Thomsen fekk øll trý málini, og sigurin var fult uppiborin**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

B71 hevur longu sett kós ímóti bestu deildini, eftir at fyrsti heimadysturin er avgreiddur. B71 vann á heimavølli 3-0 móti NSÍ, og sagt verður á Sandi, at sigurin var fult uppiborin.

Dysturin var ikki nógvar minuttir gamal, tá Jónsvein fekk tað fyrsta av sínum trimum málum. Hann er hægstur við nærmastu stong eftir eitt innlegg úr vinstru síðu og høvdar bóltin inn. B71 kom væl frá byrjan og var yvirhøvur vandamiklari.

NSÍ royndi tó eisini at bíta frá sær, og útiliðið var nær við onkuntíð. Ken Nónklett hevði bestu royndina á málið hjá Valdemar. Hann fluktaði bóltin fyrstu ferð, men polski málverjin fekk hendurnar á bóltin.

Restin av fyrra hálvleiki gekk spælið báðar vegir, og liðini høvdu sínar royndir á málið, men tað gjørdist ongantíð veruliga vandamikið.

### B71 dregur frá

Í seinna hálvleiki dró B71 frá runavíkingum við tveimum málum frá Jónsveini Petersen, sum var í hopla henda dagin.

Næsta mál hansara fall eftir miðskeiðis í seinna umfari. Aftur hesuferð var tað eitt innlegg úr vinstru síðu, sum hann gjørdi sær dælt av. Hesuferð fekk hann fótin á bóltin, ið smeyg sær framvið málverjanum.

Seinasta málið kom móti endanum av dystinum, og tá hevði NSÍ sligið seg til tols við einum tapi. Jónsvein kom tá at standa púra leysur við opnum máli, og hann hevði lætt við at skumpa bóltin innum.

NSÍ hevði sum heild ikki so nógvar hóttanir móti málinum hjá B71, sum hevði leikliga yvirvág.

B71 slapp væl frá byrjanini í hesum kappingarárinum. Tey flestu munnu vænta, at liðið fer at vera við í oddastríðnum, tá kappingin fer at halla seinni í ár, men tað er kanska heldur tíðliga at útnevna sandoyingar til favorittar, tí fleiri onnur sterk lið eru við í kappingini í ár.

### Dysturin í tølum:

**B71 – NSÍ 3-0 (1-0)**
1-0: Jónsvein Knudsen
2-0: Jónsvein Knudsen
3-0: Jónsvein Knudsen